# Endaðu arbeiðið

*Løgmanssteypið: HB lat ongan iva vera um samlaða sigurin á VB*

JÁKUP MØRK

VB-HB 1-2 (0-1)
HB víðari við 8-3 samanlagt

Eftir at hava vunnið greiðan 6-2 sigur á VB í fyrru hálvfinaluni, mundu tey fægstu vera í iva um, at HB at hevði tryggjað sær sessin, áðrenn farið varð á vøllin vesturi á Eiðinum í Vági.

### Løgdu ikki ov nógv fyri

Tað tóktist eisini greitt, at liðini bæði vóru fullgreið um, at hendan hálvfinalan í roynd og veru var avgjørd, og tí legði einki av liðunum ov nógv fyri, soleiðis at skaðar og annað kundu gera um seg og kanska skapa ófrið í oddastríðnum í landskappingini, har bæði liðini eru heilt væl við.

HB byrjaði heldur meira verjukent enn teir hava gjørt í undanfarnu dystunum, og serliga merkisvert var, at teir nú høvdu skift til eina 3-5-2 spælskipan, soleiðis at talan varð um beinleiðis mansverjan av teimum báðum pólsku áleyparunum hjá VB.

Hvønn mun hetta hevði gjørtí samlaða úrslitinum er ilt at siga, tí VB royndi so at siga ongantið at leggja veruligt trýst á HB liðið.

### Málini

Trý mál komu í dystinum, og av hesum átti HB sum kunnugt tvey.

Bárður Mortansson skey einasta málið í fyrra hálvleiki, eftir at Ingi og hann høvdu VB hálvuna fyri seg sjálvar, og Ingi valdi at trilla til unga álopsmannin, heldur enn at royna sjálvur.

Seinna umfarið varð tað Jón Rói, sum fekk VB hálvuna at renna á, eftir at Rúni Nolsøe stakk inn um VB verjuna, og heldur ikki hann sveik álitið.

VB fekk at enda pyntað um úrslitið, eftir at Jón Gærdbo av brotsteigarmarkinum smekkaði til, tá bólturin varð spældir innfyri úr vinstru.

### Greipan á veg?

HB hevur sostatt enn einaferð leikt seg í steypafinaluna, og skal talan aftur í ár gerast um ein greipuvinnara, er einki at ivast í, at HB er einasta liðið, sum hevur ein veruleikakendan møguleika fyri hesum.

Við spælinum, sum ungu havnarmenninir hava sýnt seinastu dystirnar, er heldur ikki óhugsandi at so verður. Týdningarmikið er tó, at teir taka ein dyst í senn, og ikki fara at hugsa tveir trígggjar og fýra dystir fram.

Megna teir hetta tykist greipan als ikki at vera langt burturi, men tað kann eisini vera, at vit øll eru klókari um knappan mánað, tá GÍ hevur vitjað á Tórsvølli.

### VB-HB 1-2 (0-1)

HB víðari við 8-3 samanlagt

0-1: Bárður Mortansson
0-2: Jón Rói Jacobsen
1-2: Jón Gærdbo

Dómari: Kim Ejdesgaard

**VB:**
Bjarni Johansen - Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen, Jón Pauli Olsen - Palli Augustinussen, Tórður Holm, Milan Kulic, Janus Kjærbo - Krzysof Popczynzki, Robert Cieslewicz

**HB**
Bárður Johannesen - Hans á Lag, Jóhannis Joensen, Símun Eliasen - Ingi Rasmussen, Rói Árting, Rúni Nolsøe, Pætur Dahl, Janus Joensen - Bárður Mortansson, Andrew av Fløtum



*Bárður Mortansson skeyt annað av málunum hjá HB móti VB*

# Hava ikki mist takið á hornunum

*Løgmanssteypið: GÍ megnaði at halda tætt móti vágamonnum, og tískil brast dreymurin hjá samansetta liðnum um at røkka finaluni í steypakappingini*



*Vandi tóktist vera á ferð, tá Darius kom fram við í teimum deyðbóltsstøðum, sum vágamenn vunnu sær*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

FS Vágar-GÍ 0-0
GÍ víðari við 4-3 samanlagt

Eftir tepra tapið í Gøtu í fyrry hálvfinaluni, vóru helst fleiri vágafólk, sum hómaðu møguleikan fyri einum heldur óvæntaðum finalusessi í steypakappingini.

Dysturin móti GÍ leygardagin hevði helst eisini sítt at siga í hesum sambandi. Her megnaðu vágamenn endiliga at prógva, at tað ber til at vinna móti liðum í bestu deildini, og fyri sjálvsálitið hevði hesin sigur helst alstóran tydning.

### Tamt i fyrra

Fyrra umfarið av dystinum mánadagin gav eisini ábendingar um, at tað kanska kundi eydnast vágamonnum at fáa ein sigur móti gøtumonnunum, sum als ikki tykjast hava funnið rætta spælið fram í ár.

GÍ hevði vindin í ryggin, og hetta viðførdi eisini, at teir høvdu góðar fortreytir fyri at leggja trýst á vágaliðið.

Teir heilt stóru møguleikarnir varð tó sjáldan talan um, tó at Remi einar tvær ferðir noyddist út í fulla longd at verja fyri skotum frá ávíkavist Magna Jarnskor og Súna Olsen. Vágamenn vóru tó ikki sørir, og við eitt sindur av hepni kundi eisini eydnast Kim Poulsen at lagt heimaliðið framum, men tvørstongin bjargaði fyri GÍ.

### Vandamiklir deyðbóltar

Seinna umfarið hevði heimaliðið vindin í ryggin, og tað tóktist eisini greitt, at teir ætlaðu at gagnnýta henda sum best.

Hetta hevði eisini einstakar vandamiklar støður framman fyri GÍ málinum við sær, men hinvegin var eisini um reppið, at GÍ brádliga avgjørdi dystin, tá Remi við eini frálíkari bjarging forðaði fyri, at Bartal Eliasen stútaði bóltin í málið.

Í hinum endanum var mesti vandin á ferð, tá verjurisin, Darius, kom sær framvið í deyðbóltsstøðum, og eina ferð tók bólturin í stólpan, áðrenn GÍ verjan fekk ruddað bóltin burtur.

Eisini gav støðuga trýstið einstakar aðrar møguleikar, men í flestu førum gjørdist talan um skot úti frá, harav eitt frá Tór-Ingar Akselsen tók í tvørstongina á vegnum út.

Sum tíðin gekk, tóktist tað alt meira sannlíkt, at gøtumenn skuldu megna at standa móti trýstinum. Tað var sjónligt, at teir høvdu royndirnar, sum eru so týdningarmiklar í slíkum dystum, og hóast tað onkuntíð stóð nógv á, so var ongantíð líkt til, at talan skuldi gerast um ræðslukent verjuspæl.

### Geva altíð alt

Seinastu løtuna av dystinum royndu vágamenn at flyta alt fólkið fram, og royndu teir so at senda langar bóltar móti høvdinum á Darius. Nærmast eini avger mundu teir tó vera, tá Bartal Eliasen skuldi leggja aftur til Sunnvard, men í staðin stútaði beint fram við stólparótini. At Remi so eisini kom fram við til eftirfylgjandi hornasparkið nyttaði heldur einki, og tá Lassin so floytaðu fyri seinastu ferð, kundu GÍ leikararnir fegnast.

Finalusessurin í sjálvum sær er sjálvandi ein góð orsøk at fegnast um, men gleðin á gøtumonnunum botnar helst eisini í, at teir við samanlagda sigrinum á vágamonnum framvegis hava møguleikan at fáa okkurt burtur úr einum kappingarári, sum hevur verið alt annað enn væl eydnað higartil.

Sjálvandi kunnu teir framvegis gera onkrar skreytir í landskappingini, men við tíggju stigum upp til ovasta liðið tykist tað ósannlíkt, at teir skulu røkka nøkrum í so máta hetta kappingarárið.

Nú eru teir bert ein dyst frá sigri í steypakappingini, og hóast HB helst má metast sum favorittur at vinna finaluna, so hevur søga seinastu tíggju árini lært okkum, at tá tosað verður um GÍ, verður eingin avgerð tikin, fyrr enn leikararnir hava givið alt tað teir orka í 90 minuttir ella so leingi, sum dómarin ikki hevur blást dystin av.

### FS Vágar-GÍ 0-0

FÍ víðari við 4-3 samanlagt

Dómari: Lassin Isaksen

**FS Vágar:**
Remigius Mikoliunis, Emil Hentze, Zylvanius Sudis, Darius Magdisauskas, Rimvydas Bakus – Tór-Ingar Akselsen, John Johansen, Albert Ari Thomassen, Sonni Johansen – Birgir Joensen, Kim Poulsen

**GÍ:**
Sunnvard Joensen – Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Martin Thomsen – Rúni Justinussen, Helgi L. Petersen, Magni Jarnskor, Pauli Jarnskor, Súni Olsen – Hans Pauli Petersen, Henning Jarnskor



# EURO 2000 endaspælið

## Bólkur A

**Týskland Rumenia 1-1 (1-1)**
1-0:Moldovan 3.
1-1: Scholl 27.

**Portugal-Ongland 3-2 (2-2)**
0-1: Scholes 3.
0-2: McManaman 18.
1-2: Figo 22.
2-2: J. Pinto 37
3-2 Gomes 59.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 1 | 0 | 0 | 3-2 | 3 |
| 2 Týskland | 0 | 1 | 0 | 1-1 | 1 |
| 3 Rumenia | 0 | 1 | 0 | 1-1 | 1 |
| 4. Ongland | 0 | 0 | 1 | 2-3 | 0 |

**Komandi dystir:**

17.06 Rumenia-Portugal
17.06 Ongland-Týskland
20.06 Ongland-Rumenia
20.06 Portugal-Týskland

## Bólkur B

**Belgia-Svøríki 2-1 (1-0)**
1-0: Goor 43.
2-0: E. Mpenza 46.
2-1: Mjallby 52.

**Turkaland-Italia 1-2 (0-0)**
0-1: Conteh 52.
1-1: Ogan 61.
2-1: Inzaghi (br.) 70.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Belgia | 1 | 0 | 0 | 2-1 | 3 |
| 2 Italia | 1 | 0 | 0 | 2-1 | 3 |
| 3 Svøríki | 0 | 0 | 1 | 1-2 | 0 |
| 4. Turkaland | 0 | 0 | 1 | 1-2 | 0 |

**Komandi dystir:**

14.06 Italia-Belgia
15.06 Svøríki-Turkaland
19.06 Turkaland-Belgia
19.06 Italia-Svøríki

## Bólkur C

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Spania | 0 | 0 | 0 | 0-0 | 0 |
| 2 Noreg | 0 | 0 | 0 | 0-0 | 0 |
| 3 Jugoslavia | 0 | 0 | 0 | 0-0 | 0 |
| 4 Slovenia | 0 | 0 | 0 | 0-0 | 0 |

**Komandi dystir:**

13.06 Spania-Noreg
13.06 Jugoslavia-Slovenia
18.06 Slovenia-Spania
18.06 Noreg-Jugoslaivia
21.06 Jugoslavia-Spania
21.06 Slovenia-Noreg

## Bólkur D

**Frakland-Danmark 3-0 (1-0)**
1-0: Blanc 16.
2-0: Henry 64.
3-0: Wiltord 92.

**Holland Kekkia 1-0 (0-0)**
1-0: F. de Boer (br.) 88.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 1 | 0 | 0 | 3-0 | 3 |
| 2 Holland | 1 | 0 | 0 | 1-0 | 3 |
| 3 Kekkia | 0 | 0 | 1 | 0-1 | 0 |
| 4 Danmark | 0 | 0 | 1 | 0-3 | 0 |

**Komandi dystir:**

16.06 Kekkia-Frakland
16.06 Danmark-Holland
21.06 Danmark-Kekkia
21.06 Frakland-Holland

# So byrjaði fótbóltssummarið

*Nei, sipað verður ikki til veðrið, men heldur til sjónvarpsskýggjan, sum komandi vikurnar fer at varpa landsdystirnar úr Hollandi og Belgia*



*Donsku vónirnar fingu eitt álvarsligt skot fyri bógvin, tá danir vórðu spældir niður og norð av Fraklandi*

JÁKUP MØRK

Eftir góðveðrið í mei mánaði, vóru helst mong, sum við gleði bitu merki í, at lágtrýstini við regni og vindi komu um okkara leiðir móti endanum av undanfarnu viku.

Hetta gav sofaíðkarunum møguleika at sita inni í hyggja at EM-fótbólti heldur enn at stríðast við at spula tún ella lúka í urtagarðinum, og at døma efdir dystunum higartil, verður talan kanska als ikki um nakað keðiligt endaspæl.

### Gott undirhald

Vanliga verður tikið til, at fyrstu dystirnir í endaspølunum eru teir keðiligast at hyggja at. Aloftast eru liðini so ræðslusligin fyri at tapa fyrsta dystin, at tey gloyma alt um álopsfótbólt, og í staðin leggja doyðin á, at mótstøðuliðið ikki skorar, men soleiðis tykist ikki at vera í ár.

Eftir ein opningsdyst, sum, hóast hann ikki var av teimum bestu, var nakað væl frægari enn so nógvir aðrir av hesum slag, hava vit longu nú sæð nakrar heilt góðar dystir, sum hava gjørt sítt til, at vónirnar um eitt gott fótbóltssummar framvegis liva – og liva væl.

### Ring norðurlendsk byrjan

Meðan hvørki Belgia ella Svøríki vístu seg at vera eitt av teimum, sum roknast skal við, so góvu hini bæði liðini í bólkinum okkum ein undirhaldandi dyst. Serliga tóktist Italia at vera væl fyri og spældu meira álopssinað enn leingi, men turkarnir vera undir ongum umstøðum nakar gloypibiti hjá Belgia ella Svøríki.

Sæð við føroyskum eygum, hevði dysturin hjá Danmark kanska størsta áhugan, men mest áhugaverda við dystinum var, at Frakland aftur er farið at spæla sum heimsmeistarar.

Verður sæð burtur frá fyrsta korterinum ella so, vóru fransmenninir fleiri klassar omanfyri danir, og serliga tóktist miðvøllurin og álopið at rigga væl. At enda vóru danir so móðir, at teir valla fingu runnið seinasta korterið, og í roynd og veru kundi franski sigurin verið størri, um leikararnir høvdu havt áhuga í hesum.

### Órættvíst kekkikst tap

Hini bæði liðini í bólkinum prógvaðu í hvør sínum hálvleiki, at heldur ikki móti teimum, skulu danir rokna við nøkrum løttum stigum.

Eftir at heimaliðið í fyrra hálvleiki hevði havt tamarhald á tí mesta, blakaðu kekkar alt varnið fyri borð seinna umfarið, og tað tóktist heldur órættvíst, at hollendingar skuldu fáa sigursmálið, tá Frank de Boer setti brotsspark í netið, eftir at tvíburðabróðir hansara fekk tiltuskað sær eitt heldur tunt brotsspark.

Hóast talan í allar mátar var um ein órættvísan sigur, so er kortini ikki vist, at føroysku hyggjararnir tóku synd í kekkum, sum høvdu royndir á bæði stólpa og tvørstong í seinna hálvleiki.



*Filippo Inzaghi helt høvdið kalt, og legði Italia á odda 2-1 móti Turkalandi*

### Hagi enn í serflokki

Mánadagin varð so hol sett á bólk A, og eisini her gjørdist talan um tveir sera áhugaverdar dystir.

Í tí fyrra, millum Týskland og Rumenia, prógvaðu rumenar enn einaferð, at hóast fleiri av stjørnum teirra nú eru komnir nakað upp í árini, so er framvegis dugur í teimum, og serliga stuttligt var at síggja Hagi, sum framvegis spælir sum ein unglingi. Spell at heimurin um stutta tíð ikki longur hevur møguleika at síggja hansara evni á einum fótbóltsvølli.

Týskland megnaði tó at fáa stig burtur úr dystinum, og hetta kann í øllum førum ikki sigast um Ongland. Hóast teir tíðliga í dystinum komu á odda við tveimum málum, so megnaðu teir ikki at halda fast um leiðsluna, og alt í alt var tað fult uppiborið, at tað ístaðin gjørdist Portugal sum vann 3-2 í einum dysti, sum helst var meira undirhaldandi enn væl spældur.

### Komandi dagarnir

Eftir evstamark í gjár vórðu tveir dystir spældir, og uttan iva verður spennandi at síggja, hvussu norsku grannar okkara standa seg móti sponsku favorittunum, men eisini verður spennandi at vita, hvussu leikur fer, tá Slovenia og Jugoslavia skulu royna seg móti hvørjum øðrum. Vónandi fer umtalan av hesum at snúgva seg um tað, sum fer fram á vøllinum heldur enn uttanfyri.

Í dag verður so at siga fótbóltsfrítt. Bert ein dystur á skránni, har vinnarin av Italia-Belgia kann gerast fyrsta liðið, sum tryggjar sær sess í fjórðingsfinalunum.

Jú, fyrstu dagarnir framman fyri skíggjan hava so avgjørt birt undir vónirnar til eitt frálíkt fótbóltssummar.



*Risin, Koller, var alla tíðina ein stór hóttan, men Kekkia mátti at enda lúta fyri vertunum úr Hollandi*